# Danskir hermenn fingið minnisvarða

Teir donsku hermenninir í Camp Bastion í Afghanistan hava reist ein minnisvarða til minnis um teir donsku hermenninar, sum eru falnir í Helmand-landslutinum, sum er har suðuri í landinum. Mikkel Soelberg, major-ur hjá Hærens Operative Kommando, sigur við Ritzau, at tað var ein rørandi løta, tá minnisvarðin bleiv avdúkaður í gjár, og nøvnini á timum falnu vórðu lisin upp. Nú skulu gullplátur við nøvnunum setast á minnis-varðan, og so skal økið rundan um hann fríðkast.



# Færri flugu

Munandi færri fólk ferðaðust um altjóða flogvøllin í Kelfavík í januar í ár enn í sama mánað í fjør. Morgunblaðið skrivar, at í januar í 2008 ferðaðust 117.000 fólk um vøllin í Keflavík, men at í síðsta mánað var talið bara góð 84.000. Tað er ein afturgongd upp á heili 28 prosent. Av flogvøllinum verður sagt, at talið á ferðafólki til og úr Íslandi var 32 prosent minni í síðsta mánað enn í januar í fjør. Talið á teimum, sum millumlendu á veg um Atlantshavið, minkaði eisini, men ikki so nógv.

# Bárður Nielsen leggur frá sær sum stjóri í Stórutjørn



*Hóast hann kundi verið Føroya løgmaður í dag, angrar Bárður Nielsen onki. Men hann tímdi ikki bara at sita og trilla tumlar, og tí er hann nú farin frá sum stjóri fyri størstu byggiætlan í Føroya søgu nakrantíð. Hann hevur nú tikið við sum stjóri á MVH, har Álvur Haraldsen fekk hesa myndina av honum í morgun*

**Tað er ikki hugsingur um at fáa fígging til verkætlanin, sum støðan er nú, og eg tími ikki bara at sita og trilla tumlar, sigur hann**

STÓRATJØRN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg tími ikki bara at sita og trilla tumlar.

Tað staðfestir Bárður Nielsen, sum nú hevur lagt frá sær sum stjóri fyri risa-stóru Stórutjørn-verkætlan-ina í Havn.

Hann hevur nú ásannað, at sum støðan er, hava teir ongan sum helst møguleika at seta Stórutjørn ætlanina í verk.

Sostatt er heldur onki innihald í stjórastarvinum longur, og tí hevur Bárður Nielsen nú tikið stigið fult út og hevur lagt frá sær

### Ikki eftir vild

Bárður Nielsen hevði bjart-ar vónir, tá ið hann brádliga legði frá sær sum landsstýr-ismaður í fíggjarmálum, fyri at blíva stjóri fyri Stóru-tjørn verkætlanini, sum skuldi gerast í Havn.

Hetta var ein stór avgerð hjá honum at taka, tí mong spáddu hann at hava eina bjarta framtíð í politikki, og flestu mettu hann sum besta boðið upp á formanssessin í Sambandsflokkinum. Og hevði hann hildið seg til politikkin, hevði hann verið Føroya Løgmaður í dag....

Men møguleikin at standa á odda fyri størstu byggiverk-ætlan í Føroya søgu nakr-antíð, var størri freisting enn hann orkaði at standa ímóti, og sostatt vinkaði hann polit-ikkinum farvæl og settist í stjórasessin í Stjórutjørn.

Síðani hevur milt sagt ikki gingið eftir vild við Stórutjørn, og fleiri ferðir hava søgur gingið um, at verkætlanin er útsett.

Men nú kom so endaliga staðfestingin. Verkætlanin er løgd á ís.

Tað hendi, tá Bárður Niel-sen nú um dagarnar legði frá sær sum stjóri fyri Stóru-tjørn.

Hann hevur í staðin tikið við sum stjóri á Maskinverk-staðnum á Hjalla, MVH, har hann longu er farin til arbeiðis.

### Tímir ikki at trilla tumlar

Bárður Nielsen staðfestir, at hetta merkir, at ætlanin at byggja Stórutjørn er løgd á hyllina.

Men hann leggur dent á, at ætlanin er ikki slept, og hóast hann er farin frá sum stjóri, er hann framvegis í nevndini.

Hinvegin er tað ómøguligt at siga, nær hon verður tikin uppaftur.

- Sum støðan er nú, er heilt ómøguligt at fáa fígg-ing til eina verkætlan sum hesa, og tað eru ikki útlit til at støðan batnar í nærmastu framtíð.

- Vit hava havt følarar úti. Men støðan er so vánalig á fíggjarmarknaðinum, at tað er ikki so frægt sum neyðugt at hava følarar úti, tí á øllum kassum er lokið smekkað aftur, sigur hann.

- Og eg havi ikki hug til bara at sita og trilla tumlar, til støðan í samfelagnum batnar aftur, leggur hann afturat.

- Sum støðan er nú, er onki innihald í starvinum sum stjóri fyri Stórutjørn longur, staðfestir hann.

### Vónleyst at siga

Bárður Nielsen sigur, at tað er eisini vónleyst at siga, nær gongd kemur á aftur.

- Men fyri at fáa fígging til eina so stóra ætlan sum hesa, er ikki bara nóg mik-ið, at gongd kemur á aftur samfelagshjólini. Tað skal hava verið gongd í teimum í eina tíð, áðrenn nakar aft-ur hættar sær upp í eina verkætlan, sum hesa, sigur hann.

Bárður Nielsen leggur kortini dent á, at boðini frá íleggjaranum, Jákupi á Dul, eru greið, og tey eru, at ætlanin er ikki slept.

- Hon er bara løgd á ís í eina tíð, til samfelagsbú-skapurin batnar aftur, og tað fer at bera til at fáa fígg-ing, so verður hon tikin fram aftur.

Men um Bárður Nielsen verður stjóri aftur, tá tað aft-ur fer at lýsna í eystri, dugir hann onki at siga um.

- Tað kann bara tíðin vísa, sigur hann.

### 300 milliónir

Tilsamans var Stóratjørn-verkætlanin upp á langt yvir eina milliard. Men fyrsta byggistig fevndi um ein handilsmiðdepil fyri 300 milliónir við vegum og ann-ars øllum, sum hoyrir til.

Bárður Nielsen sigur, at øll loyvi vóru fyri so vítt við at koma undir land, so tað er um at vera klárt at seta spakan í.

Annað byggistig skuldi vera ein part av íbúðunum og ein skrivstovubygningur.

## Ongan løgmann í búk-inum

Bárður Nielsen, sum í dag er stjóri á Maskin-verkstaðnum á Hjalla, var einaferð ein popul-erur maður í Sambands-flokkinum. Tá takkaði hann nei at stilla upp sum formaður, og eitt sindur seinni fór hann frá sum landsstýrismaður og byrjaði sum stjóri fyri Stórutjørn.

Maðurin var í veruleik-anum ein góður kandi-datur til formanssessin í Sambandsflokkinum, og um restin av korthúsinum eisini hevði lagað seg, sum tað hevur gjørt, so er stórur møguleiki fyri, at Bárður Nielsen var løgmaður í dag. Men avgerðina at fara úr pol-itikki hevur hann ongan-tíð angrað.

- Eg hevði altíð eina ætlan at fara útaftur í vinnulívið, og tað er lætt-ari at gera tá mann er ungur heldur enn, tá mann er blivin eini 55 ár, sigur Bárður Nielsen, sum ongantíð hevur angr-að, at hann fór úr polit-ikki.

Hann sigur seg í veru-leikanum hava torført við at angra nakra av-gerð.

- Mann skal sjálvandi læra av fortíðini, men eg royni altíð at liva í nútíðini og framtíðini, og tí angri eg generelt fá ting, sigur Bárður Niel-sen. Í samband við, at hann gavst sum politikari sigur hann eisini, at hann tók eina avgerð, sum var best útfrá fyritreytunum, sum vóru tá hann tók avgerðina.

Um løgmanssessin sig-ur hann, at hann ongantíð hevur havt stóran áhuga í hesum starvinum.

**eij.**